## Jacob harmast

Sambært veðurlagssáttmálanum hava Føroyar bundið seg til at lata Danmark hagtøl um dálking á hvørjum ári, men kortini hava vit ikki latið dønum nøkur hagtøl síðani 2003. Tað hevur fingið ST til at átala Føroyar. Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, sigur, at tað er stak óheppið, at Føroyar ikki halda teir sáttmálar, sum vit hava bundið okkum til, men umsitingin hevur ikki arbeiðsorku til at útvega hagtølini, sigur hann.

## Fleiri á flogi

Vøksturin í ferðafólkatalinum um flogvøllin í Vágum tykist ikki taka nakran enda. Í apríl ferðaðust 16.671 fólk um vøllin, og tað var 6,9 prosent fleiri enn í apríl í fjør, tá talið var 15.598. Kortini var afturgongd á øllum farleiðunum uttan á farleiðunum til og úr Danmark. Teir fýra mánaðarnar, sum eru farnir av hesum árinum, hava 54.315 fólk ferðast um flogvøllin í Vágum, og tað eru heili 14,1 prosent fleiri enn somu mánaðir í 2006.

# Menningartarnað í størri vanda enn onnur

**Mánakvøldið var fyrilestur Miðlahúsinum við Anette Løwert, yvirlækna í psykiatri, um menningartarni og sálarbrek**

FYRILESTUR
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Fólk við menningartarni eru í nógv størri vanda fyri at verða rakt av likamligum og sálarligum sjúkum. M.a. hetta fingu tey umleið 80 fólkini at vita, sum vóru komin til fyrilestur í Miðlahúsinum hjá danska yvirlæknanum og sexologinum Anette Løwert mánakvøldið.

Tað vóru Javni, Pedagogfelagið og Psykiatriski depilin, sum skipaðu fyri fyrilestrinum í felag, í sambandi við, at at Psykiatriski depilinarbeiðir við at styrkja um viðgerðartilboðið til fólk við menningartarni og sálartrupulleikum.

Anette Løwert hevur drúgvar royndir at arbeiða við fólki, ið hava menningartarni og sálartrupulleikar, og ætlanin er, at hon skal virka sum konsulentur fyri Psykiatriska depilin á hesum øki.

Hon greiddi m.a. frá, at sálarsjúkur og sálarbrek koma nógv oftari fyri hjá fólki við menningartarni enn hjá teimum sokallaðu normalu. Harafturat koma hesar diagnosur ikki fyri í somu raðfylgju, sum teimum, ið ikki hava meinningartarni. Anette Løwert samanbar sálarbrek hjá fólki við menningartarni við at skræða eina psykiatribók í smáar lepar og so blaka teir upp í luft og so seta hetta saman aftur.



*Anette Løwert, yvirlækni í psukiatri undir fyrilestrinum í Miðlahúsinum*

### Demens

Flestu fólk við menningartarni hava fingið hetta av heilaskaða. Tað er kortini ikki bert sálarbrek, men sum sgat eisini fysisk brek hesi fólk hava størri møguleika at fáa enn onnur. T.d. kunnu brek á hoyrn og sjón, hjartasjúkur, spasticitetur og sukursjúka nevnast, ið fólk við menningartarni dragast meira við enn aðrir samfelagsborgarar.

Anette Løwert greiddi eisini frá, at tað er týdningarmikið ikki tosa psykotiskum fólki eftir munninum. T.d. um onkur sá eina slangu, so var týdningarmikið at siga við tey, at hetta var bara ikki í teirra høvdi og anga aðrastaðni. Hallucinatiónir (tað síggja lutir, ið ikki eru har) og rangsjónir, (at síggja lutir á annan hátt, enn veruleikin er) eru altíð óhugnalig og slítandi fyri sjúklingin.

- Tey síggja ongantíð ein fittan kettling, undirstrikaði Anette Løwert.

Tey eru tó fá, ið eru psykotisk allatíðina og sum síggja ymiskt fyri sær í meira enn nakrar tímar ella dagar í senn.

Anette Løwert umrøddi eisini minnisveik fólk. 5% av teimum sonevndu normalu fáa demens eftir at tey eru vorðin 65 ár. Hjá fólki við menningartarni fáa 22% av teimum yvir 65 ár demens og hjá fólki við Downs syndrom fáa 24 % av teimum yvir 40 ár Alzheimer demens.

### Røttu heitini

Anette Løwert umrøddi eisini tey ymsu heitini, fólk hava brúkt fyri fólk við hesum sløgum av brekum. T.d. verður ikki góðtikið longur at siga "åndsvag" av tí hett aofta verður brúkt niðrandi. Í seinastuni eru summi í Danmark farin at brúka lýsingina "folk med nedsat psykisk, fysisk funktionsevne". Hetta kann tó vera torført hjá hesum fólkum sjálvum at siga, og tí kann vera trupult at seta orð á hesi brek.



*Áhugin fyri viðurskiftunum hjá sálarsjúkum og menningartarnaðum var stórur*

# Nær kemur Clinton?



*Bill Clinton kemur ikki til Føroya tann 24. mai, sum ætlanin annars var. Seinni í vikuni verður kunngjørt, nær fyrrverandi forseting kemur til Føroya*

**- Vit hava enn eina avtalu við Clinton, sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum. Hann dugir tó ikki at siga, um útsetingin av føroyaferðini hevur nakað samband við amerikanska valstríðið**

CLINTON
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

- Eg havi ikki tíð at tosa við tykkum, og tit skulu spyrja Jan Mortensen um hatta.

Tað segði ein púra avgjørdur Onni Nordström, tá Portalurin ringdi til hansara fyrrapartin fyri at vita, hví Bill Clinton hevur útsett føroyaferðina. Onni Nordström er maðurin handan fyritøkuna World Celebrity Event, ið hevur samband við fleiri kend heimsnøvn og sum syrgir fyri, at feløg sum t.d. Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið skipa fyri fyrilestrum o.l., fáa fatur á nøvnum sum Clinton og Hans Blix.

Sjálvur sigur Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, at Føroya Arbeiðsgevarafelag enn hevur avtalu við Bill Clinton um at koma til Føroya, og at tað verður kunngjørt seinni í vikuni, nær Clinton og Blix koma til Føroya.

Spurdur, um hví Clinton hevur útsett ferðina, sigur Jan Mortensen, at hetta spyrja tey ikki nærri um, tá tað verður sagt, orsøkirnar hjá Clinton eru persónligar.

Fyri fáum døgum síðani fræ ttist, at Barack Obama var farin fram um konu Bill Clinton, Hillary Clinton, í valstríðnum um at gerast forsetavalevni hjá demokratiska flokkinum í USA. Jan Mortensen sigur tó, at tey vita einki um, um hetta kann hava nakað við útsetingina av føroyaferðini hjá Bill Clinton at gera.

- Men vit vistu, at Clinton hevði eina tætta skrá hesa tíðina, sigur Jan Mortensen.

Hann sigur tó, at talan verður ikki um, at Hans Blix kemur einsamallur til Føroya.

- Teir samstarva um fyrilestrarnar. Clinton er høvuðsnavnið, hóast hin eisini er áhugaverdur. Tað verður tað fulla arrangementið, sigur stjórin í Vinnuhúsinum.